# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Yngru føroyameistararnir í borðtennis

**Leygardagin var føroyameistarakapping í borðtennis fyri yngru deildirnar í ítróttarhøllini í Trongisvági, har tilsamans 60 spælarar úr TBF, Tór og Royn kappaðust**



*Smápiltar*



*Pinkur*



*Piltar*



*Smágentur*



*Smádreingir*



*Gentur*

***Smápiltar, einmansleikur***
*1. Bárður Dimon, TBF*
*2. Hákun A. Højgaard, TÓR*
*3. Ingi R. Gásadal, TÓR*

***Smápiltar, tvímansleikur***
*1. Heini Fossabrúgv og Gutti Ree Torvadal, TÓR*
*2. Ingi R. Gásadal og Hákun A. Højgaard, TÓR*
*3. Stefan Radosavljevic og Bárður Dimon, TÓR*

***Pinkur, einmansleikur***
*1. Anna Mikkjalsdóttir, TBF*
*2. Sofía Maria Ferjá, TBF*
*3. Rebekka Petersen, TBF*

***Pinkur, tvímansleikur***
*1. Sofía Maria Ferjá og Rebekka Petersen, TBF*
*2. Lóa Farstad og Anna Mikkjalsdóttir, TBF*
*3. Ellen Elisabeth Hammer og Annika Holm, Royn*

***Piltar, einmansleikur***
*1. Knútur Jóanesarson, Tór*
*2. Bjørgvin Sveinbjørnsson, Royn*
*3. Sveinur Nolsøe, Tór*

***Piltar, tvímansleikur***
*1. Knútur Jóanesarson og Sveinur Nolsøe, Tór*
*2. Bjørgvin Sveinbjørnsson, Royn, og Hávar Albinus, TBF*
*3. Ingi R. Gásadal og Hákun A. Højgaard, Tór*

***Smágentur, einmansleikur***
*1. Vár Holm, TBF*
*2. Lív Øster, TBF*
*3. Eyðbritt Holm, Royn*

***Smágentur, tvímansleikur***
*1. Vár Holm og Lív Øster, TBF*
*2. Annbritt Holm og Eyðbritt Holm, Royn*
*3. Anna Mikkjalsdóttur og Sára Olsen, TBF*



*Dreingir*



*Blandaður tvímansleikur*

***Smádreingir, einmansleikur***
*1. Eyðun Ellendersen, Royn*
*2. Knútur Jóanesarson, Tór*
*3. Árnfríður Olsen, Royn*

***Smádreingir, tvímansleikur***
*1. Knútur Jóanesarson og Sveinur Nolsøe, Tór*
*2. Eyðun Ellendersen og Bjørgvin Sveinbjørnsson, Royn*
*3. Eyðfinnur Jensen og Árnfríður Olsen, Royn*

***Gentur, einmansleikur***
*1. Marin Sofía Brattalíð, TBF*
*2. Lív Øster, TBF*
*3. Vár Holm, TBF*

***Gentur, tvímansleikur***
*1. Vár Holm og Lív Øster, TBF*
*2. Annbritt Holm og Eyðbritt Holm, Royn*
*3. Birita Mortensen og Marin Sofía Brattalíð, TBF*

***Dreingir, einmansleikur***
*1. Jónhard Ferjá, TBF*
*2. Tóki Thorsteinsson, Tór*
*3. Eyðun Ellendersen, Royn*

***Dreingir, tvímansleikur***
*1. Tóki Thorsteinsson og Bjarki Olsen, Tór*
*2. Jónhard Ferjá, TBF, og Heini Olsen, Tór*
*3. Knútur Jóanesarson og Sveinur Nolsøe, Tór*

***Blandaður tvímansleikur***
*1. Lív Øster, TBF, og Knútur Jóanesarson, Tór*
*2. Sofía Maria Ferjá og Jónhard Ferjá, TBF*
*3. Eyðbritt Holm og Eyðfinnur Jensen, Royn*

# Føroyingar á ítróttarlegu í Svøríki

**ÍSB bjóðar 10 ungum føroyingum við breki at koma við á norðurlendsku barna- og ungdómsleguna, sum verður í Eskilstuna í Svøríki mánaðarskiftið juni-juli**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Annaðhvørt ár verður skipað fyri norðurlendsku barna- og ungdómsleguni fyri 12 til 16 ára gomul, ið bera brek. ÍSB ætlar at senda 10 ungfólk á leguna, sum í ár verður í Svøríki*

Annaðhvørt ár verður skipað fyri norðurlendsku barna- og ungdómsleguni, NBU, sum er fyri 12 til 16 ára gomul, ið bera brek. Hesa ferð verður legan í Eskilstuna í Svøríki, sum liggur umleið 100 kilometrar vestan fyri Stockholm, í døgunum frá 26. juni til 3. juli.

Legan er fyri ítróttaáhugað ungfólk, men ikki er neyðugt at hava íðkað ítrótt fyrr. Høvuðsendamálið við leguni er at fáa fleiri við breki at koma upp í ítrótt, og tí ber legan eisini dám av nógvum sosialum virksemi, sum gevur ungu norðanlendingunum møguleika at knýta vinarbond.

Í eina viku verður svomið, spælt borðtennis og íðkaður frælsur ítróttur, samstundis sum roynast kunnu ymisar nýggjar og áhugaverdar ítróttagreinar. Harumframt verður eisini skipað fyri undirhaldi, útferðum og diskoteki.

– Okkara royndir eru, at tey ungu koma heim við nógvum góðum upplivingum, øktum sjálvsáliti og nógvum góðum vinum, sigur ÍSB, sum í ár ætlar at senda eitt lutfalsliga stórt ferðalið avstað, og tí bjóðar 10 ungum føroyingum við breki at koma við. Eisini ber til at søkja um at koma við sum leiðari, og ÍSB vil tí fegið frætta frá ítróttaráhugaðum, sum eru yvir 20 ár og hava hug at koma við.

Í 2003 var legan í Føroyum, tá børn og ung úr øllum norðurlondum savnaðust um tað, øll hava til felags, ítróttin.